# Skulu finna ársins DJ

**Leygarkvøldið fara 10 føroyskir plátuvendarar at kappast um heitið Ársins DJ**

DISKOTEK
*Eyðun Klakstein*

Bankandi diskoteksrútmur, bleiktrandi ljós og lívligir plátuvendarar.

Tað er nakað av tí, sum kann upplivast í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið.

Tá fara 10 føroyskir plátuvendarar at kappast um meira mótarætta heitið Ársins DJ.

Í vetur hava innleiðandi kappingar verið kring landið, og eftir hesar kappingar eru 10 plátuvendarar funnir, sum nú koma at kappast í finaluni.

### Tveir kappast í senn

Kappingin fer fram á tann hátt, at tveir plátuvendarar koma at kappast beinleiðis ímóti hvørjum øðrum.

Teir fara at spæla tónleik í tvær ferðir 10 minuttir og skulu royna at spæla upp ímóti hvørjum øðrum.

– Hetta fremur kreativitetin og kappingarandan, umframt at hesin háttur eisini tryggjar eina áhaldandi og undirhaldandi kapping, siga fyrireikararnir.

### Áskoðarar døma eisini

Í finaluni verður dømt á sama hátt, sum í innleiðandi kappingunum.

Tríggir dómarar fara at meta um ljóðstýring, tónleikaval og ljóðbland, framførslu og heildina. Í hvørjum av hesum ber til at fáa í mesta lagi 25 stig.

Áskoðararnir fáa eisini ein fingur við í spælinum, tí 200 tilvildarliga valdir áskoðarar fáa atkvøðuseðlar, har tey kunnu atkvøða fyri einum plátuvendara.

Áskoðararnir telja sum ein dómari.

### Teir 10 sum kappast

Finalistarnir í kappingin í leygarkvøldið eru 10 í tali, og teir hava flest allir nøvn, sum sigur lítið um, hvørjir teir eru.

Úr Norðoyggjum luttaka DJ Maximinus og DJ Ice, úr Eysturoynni DJ Mood og CD Single, úr Streymoynni DJ Estevez og Ottar Skottar, úr Vágum Tummas Gudmundsen og DJ Cool, og úr Suðuroyr Kaj Roest og Cem á Hólum.

Hurðarnar í Badmintonhøllini verða latnar upp klokkan 23.00 leygarkvøldið, og sjálv kappingin byrjar á midnátt.

# Kanska seinasta uppgávan

**Kristian Joensen, plátuvendari úr Klaksvík, ætlar sær at gevast sum DJ, vinnur hann kappingina um at gerast Ársins DJ**

DJ
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið fer hann at kappast móti 9 øðrum plátu-vendarum um at gerast Ársins DJ, og hann hevur givið sær sjálvum eitt lyfti.

– Vinni eg kappingina, gevist eg sum DJ, sigur Kristian Joensen, sum gongur undir navninum DJ Maximinus.

Hann hevur verið plátuvendari í nógv ár, og hann er javnan úti í plátuvendaraørindum.

– Eg kann akkurát tað sama gevast á toppinum, um tað skuldi hent, at eg vann. Vinnur onkur annar, ja, so haldi eg, at eg taki eitt ár afturat, sigur Kristian.

Hann kom víðari í innleiðandi umfarinum, sum varð hildið í Klaksvík í fjør.

### DJ fyri fólkið

Hvat er ein góður DJ?

– Tað snýr seg nógv um at geva fólkinum tað, sum tey vilja hava. Tú ert til fyri fólkið, sum er á dansigólvinum, og tað mást tú altíð minnast til. Tað ræður um at spæla tónleik, sum tey hava hug at dansa til, og í Føroyum merkir tað, at tú skal spæla nógv av tí tónleikinum, sum er á hitlistunum.

Hvat ætlar tú tær at spæla í finaluni leygarkvøldið?

– Tað kann eg ikki siga frammanundan, tí tað veldst um, hvat tann, sum eg skal kappast ímóti, spælir. Tað koma tveir at kappast beinleiðis ímóti hvøjrum øðrum, og tí kann eg ikki siga við vissu frammanundan, hvat eg fari at spæla.

### Mest hitlistatónleikur

Hvør tónleikur roknar tú við verður spældur í finaluni?

– Tað mesta verður hitlistatónleikur. Tað verður lítið av ordiligum techno ella trance tónleiki – mest tey væl umtóktu poppløgini, sum eru frammi. Eg ætli mær tó at tríva í okkurt rocklag.

Hvat ætlar tú at leggja teg eftir leygarkvøldið?

– Tað ræður um at fáa fólkið við, tí annars kanst tú ikki vinna nakra kapping. Eg fari at royna at koma so væl út millum fólkið við mikrofonini, sum tað ber til, og at hava samband við tey allatíðina.

– Mær dámar væl, at tað verður kappast beinleiðis ímóti hvørjum øðrum – tveir í senn – tí tað ger, at rætti vinnarin verður funnin.



*– Tú mást altíð minnast til, at tú ert til fyri fólkið, sum er á dansigólvinum, sigur plátuvendarin Kristian Joensen, sum leygarkvøldið skal kappast við 9 aðrar um at gerast Ársins DJ.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

# Michael Learns To Rock til Føroya

**Danski poppbólkurin skal ætlandi hava konsert í Føroyum 9. mars. Hetta verður samstundis fyrsta konsertin í nýggjari konsertferð hjá bólkinum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Gongst alt sum ætla, kemur kendi danski poppbólkurin Michael Learns To Rock til Føroya at hava konsert í ítróttarhøllini á Hálsi tann 9. mars.

Michael Learns To Rock gav fyri kortum nýggja fløgu út, og teir fara nú á konsertferð í sambandi við hesa fløguna.

Tað óvanliga er, at konsertferðin byrjar í Føroyum, og næsta uppgávan hjá bólkinum verður í India. Síðani skal bólkurin spæla ymsastaðni í Asia.

– Síðst í hesi vikuni rokna vit við at hava alt uppá pláss, so tá er púra greitt, at Michael Learns To Rock koma hendanvegin at spæla, sigur fyrireikararnir í HR Booking.

### Eydnaðist væl seinast

Michael Learns To Rock høvdu eina sera væleydnaða konsert í Føroyum í 1996. Tá var høllin á Hálsi stappað við fólki – eini 1600 tilsamans.

Fleiri atgongumerki kundu saktans havt verið seld til hesa konsertina, men høllin tók ikki fleiri fólk.

Nú Michael Learns To Rock koma aftur hendan vegin, passa 2000 fólk í høllina á Hálsi.

Fyrireikararnir ætla, at prísurin á atgongumerkjunum skal verða tann sami hesaferð, sum hann var í 1996 – 220 krónur.

### Útgerð við

HR Booking hevur fleiri ferðir roynt at fingið teir aftur til Føroya at spæla, síðani teir vóru her í 1996, men nústani er tað eydnast teimum.

Michael Learns To Rock vóru vælnøgdir við ferðina til Føroya í 1996, og fyrireikararnir fingu gott skoðsmál fyri konsertina.

13 fólk eru í ferðalagnum, sum ætlandi skal koma til Føroya í mars mánaði. Av hesum verða tveir journalistar frá einum av stóru donsku dagbløðunum, sum skulu gera reportasju um bólkin.

HR Booking roynir at fáa flutningin av teimum 750 kilo av útgerð, sum Michael Learns To Rock skulu hava við sær á flog, uppá pláss, og samráðingar eru við Atlantsflog um hetta.

Ætlanin er, at konsertin verður fríggjakvøldið 9. mars klokkan 20.00 í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Atgongumerki verða at fáa í Kunningarstovuni í Havn.



# Ísansgarður er opin alt árið

**Trupult hevur verið við gistingarmøguleikum í Sandoynni. Men nú er Ísansgarður aftur opin alt árið**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Gistingarhúsið Ísansgarður á Sandi er nú opið aftur alt árið*
*Mynd: Edvard Joensen*

Gistingarhúsið Ísansgarður á Sandi er nú aftur opið alt árið. Hóast skiltið sigur: »Bed and breakfast«, ber eisini til at fáa døgurða, tá biðið verður um tað.

Virkandi leiðari á Ísansgarði er Sonja Petersen á Sandi. Hon sigur, at hon hevur tikið við fyribils, meðan dagligi leiðarin, sum annars er á garðinum, er í barnsburðarfarloyvi.

Tað er kortini ikki soleiðis, sigur Sonja Petersen, at fólk er í húsinum alla tíðina. Men telefonin verður altíð tikin. Fólk kunnu ringja og biða um hús og mat. Við gistingini fæst vanliga morgunmatur, men verður biðið um tað, er eisini døgurði at fáa. Best er tó, sigur Sonja, um fólk helst siga frá dagin fyri, tá tey vilja hava døgurða.

Ísansgarður hevur annars verið stongdur nakað herfyri, men seinasta summar varð latið uppaftur, eftir at nýggir eigarar høvdu yvirtikið húsið.

Ísansgarður hevur níggju kømur, sum øll kunnu hýsa tveimum fólkum. Tó er bara eitt teirra, sum hevur egið baðirúm. Hinvegin er tað nýtt. Annars eru felags baðirúm og wc. Matstova er eisini, umframt millum annað eina sodavatnsautomat og korttelefon til gestirnar at brúka.

Sonja Petersen ásannar, at ferðslan hevur ikki verið tann stóra á Ísansgarði seinastu tíðina. Men tað kemst kanska av, heldur hon, at ov lítið hevur verið gjørt við at lýst við húsinum. Ein faldari liggur á Kunningarstovuni, men tað er líkasum ikki nóg mikið, vísa royndirnar.

Hinvegin er ætlanin at gera meira burtur úr gistingarhúsinum á Sandi í framtíðini, sigur Sonja Petersen. Ætlanir eru um at fara at byggja út. Til dømis er køkurin ov lítil, og ætlanin er eisini at fá fleiri kømur. Eini 4-5 kømur verður tað helst til, sum gjørd verða aftrat.

Eisini verður søkt um at fáa skeinkiloyvi. Tað fer hon sjálv at søkja um, sigur Sonja Petersen. Tá umbyggingin er liðug, og skeinkiloyvið væntandi er fingið, er ætlanin at hava meira beinleiðis matstovuvirksemi í húsinum. Tá verður væntandi eisini brúk fyri onkrum fólki aftrat.

Sum er, sigur Sonja Petersen, er einki stað í Sandoynni, har fólk kunnu fara út at fáa sær ein bita, ella fyri tann skuld til nakað serligt tiltak sum so. Og onkrum síkum ganga tey eisini við ætlanum um at skipa fyri á Ísansgarði. Tiltøkum í húsinum, har fólk bara kunnu koma inn á gólvið uttan at skula gista.

Ferðamøguleikarnir hava ikki verið teir bestu í Sandoynna, sigur Sonja Petersen. Hon metir eisini tað at hava verið eina orsøk til, at lítið fólk er komið til oynna aðrastaðni úr landinum. Av tí sama hevur heldur ikki verið tann øgiligi tørvurin á gistingarhúsi. Og soleiðis hevur alt bitið seg aftur í halan.

Men nú verður tað. Tróndur verður nú endaliga pensioneraður, og nýggja Teistan seta tey stórt álit á í Sandoyni.

Sonja Petersen ivast í hvussu er ikki í, at hann fer at gera sítt til, at fleiri fólk fara at ferðast í oynna. Og tá ætlar hon saman við øðrum at vera til reiðar at taka í móti teimum á Ísansgarði.



*Sonja Petersen er í løtuni leiðari á Ísansgarði*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Venus verður vatnblástur



*Nýggja vatnblásingarútgerðin hjá Tórshavnar Skipasmiðju er roynd upp á Venus*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tórshavnar Skipasmiðja hevur fingið útgerð til at vatnblása gamla máling av skipum. Sandblásing fer í søguna**

SKIPARØKT
*Edvard Joensen*

Línuskipið Venus, sum er 40 ára gamal, stendur í løtuni á Tórshavnar Skipasmiðju, har hann er vatnblástur. Talan er í grundini um somu viðgerð sum sandblásing, men nú verður vatn brúkt í staðin fyri sand.

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at hesin framgangshátturin dálkar munandi minni enn sandblásingin. Sandurin var óreinur at seta seg allastaðni, og var ofta ringur at reinsa burtur aftur. Serliga kundu trupulleikar standast av, tá eitt nú sundurtiknir motorlutir vóru nærindis har, sandblást varð. So skuldi alt reinsast afturumaftur.

Vatnið verður blást á skrokkin við slíkari megi, at alt verður heitt, og vatnið dampar burtur aftur beinanveg, sigur Gunnar Mohr.

Útgerðin, Tórshavnar Skipasmiðja nú hevur fingið, er komin úr Týsklandi og kostar hálvaaðru millión krónur.

Gunnar Mohr sigur, at Skipamsiðjan hevur vitað um hesa útgerðina eina tíð. Men ikki fyrr enn nú er avgerð tikin um at keypa hana.

Útgerðin er soleiðis, at hon kann flytast. Alt verkið stendur í eini bingju, og tað einasta, sum skal til aftrat, er í grundini ein krani at seta vatnslanguna til. Ætlanin er kortini, sigur Gunnar Mohr, at útgerðin skal standa fast inni á Skála. Tó er hon nú royndarkoyrd á Tórshavnar Skipasmiðju, har Venus er reinsaður, allur sum hann er. Ein týkari hevur verið her og lagt teimum lag á fyrstu dagarnar, Og tað tykist at ganga væl. Útgerðin er løtt at brúka. Talan er um tvey rør, sum spulað verður við, og tað krevst ein maður til hvørt. Ikki er tað tyngri enn vanligur trykkspulari heldur, láta teir at á Skipasmiðjuni.

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at til vatnblásingina verður brúkt við eitt trykk upp á 2.500 bar. Ein vanligur trykspulari hevur vanliga eitt trýst upp á 400-500 bar. Men hendan nýggja útgerðin kann eisini brúkast til vanliga reinsing, um tað skal vera. So verður trýstið bara lækkað. Tað kann skifta millum 1.000 og 2.500 bar.

Tá arbeitt verður við fullari styrki, fer hvør einasti málingaflaki av, sigur Gunnar Mohr. Tað fer hon longu við einum trykki upp á 2.300 bar, og skrokkurin verður heilt blankur. Ein tunnur rustfilmur legst á aftur, fyrsta spulað er, men hann skaðar einki, tí ein serligur grundari verður smurdur upp á beinanveg, sum forkemur tí rustinum.

Gunnar Mohr sigur, at Tórshavnar Skipasmiðja nú kann kappast við allar aðrar, sum bjóða seg fram til sandblásing. Nú verður ikki neyðugt longur at fara uttanlands at fáa slíkt arbeiði gjørt. Góðskan er minst líka góð, sum tá sandblást verður, sigur hann, og prísurin er eisini soleiðis, at væl ber til at kappast.